3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

FRÓ›I LØKSÁGAR›

No Doubt

Return of Saturn

Ein av kendastu amerikonsku tónleikabólkununum í dag er No Doubt, sum vi› eini blanding av poppi, rokki og indie elementum megna›i at selja ikki færri enn 15 mill. eintøk av undanfarnu útgávuni, nevnd Tragic Kingdom. Sjálvt um tey flestu ongantí› høvdu hoyrt um No Doubt, fyrr enn tey hoyrdu løg sum Don't Speak og Just A Girl, sum bæ›i eru tikin av Tragic Kingdom, so var hetta tri›ja útgávan hjá bólkinum.

Nú er so fjór›a útgávan hjá bólkinum veruleiki. Return Of Saturn er heiti› á fløguni sum skal tryggja at tey í No Doubt ikki vera gloymd, ella enn verri, vera innlima›i í stóra felagsskapin hjá teimum sonevndu døgnflugunum.

Tá tú lurtar eftir hesi útgávuni so møtir tú einum bólki í gó›um h‡ri, sum somulei›is er væl upplagdur. Tá tú lurtar eftir hesi útgávuni so er ikki óhugsandi at tankarnir leita til tónleikin hjá Blondie vi› Debby Harry á odda. Um ta› er tí at bæ›i Blondie og No Doubt hava hvør sín karismatiskan høvu›smann, ella kvinnu, sum ta› er í hesum føri, ella tí at tónleikurin á ein ella annan hátt líkist er trupult at siga. Í øllum førum er okkurt sum minnir um Blondie.

Gamli revurin Glenn Ballard hevur framleitt n‡ggju fløguna hjá No Doubt. Um skifti› av framlei›ara er gjørt fyri at skapa broytingar í ljó›myndini, so er hetta gjørt til fán‡tis. No Doubt ljó›a júst solei›is sum øll minnast teir. Hetta skal avgjørt ikki skiljast negativt.

Á tekstsí›uni er ta› sangarinnan Gwen Stefani sum er einará›andi. Kærleikin millum hana og sangaran í bólkinum Bush, hann eitur Gavin Russdale, er afturvendandi temai› á tekstsí›uni og ymiskt úr sambandinum teirra millum ver›ur drigi› fram.

Ta› hevur í ein vissan mun eydnast No Doubt at framganda fleiri íoyrafallandi løg á hesi útgávuni. Fyrsta stakfløgan av útgávuni nevnist Ex-Girlfriend, og hevur fingi› eina gó›a móttøku. Sjálvt um henda fløgan ikki er naka› meistaraverk, so eru óiva› nógv, sum vera gla› fyri hana.

Toni Braxton



The Heat

Ta› eru nú gingin f‡ra ár sí›ani Toni Braxton seinast lat frætta frá sær. Nú er ta› so hent aftur vi› útgávuni av The Heat, sum júst í hesum døgum, er at finna á plátuhillunum kring knøttin. Seinasta útgávan hjá Toni Braxton innihelt lagi› You're Makin' Me High, sum var eitt stórt hit í fleiri londum. Eftir at hava veri› úti í einari drúgvari juridiskari togtogan vi› plátufelagi›, er Toni Braxton klár at leggja heimin fyri sínar føtur av n‡ggjum.

Hetta er tri›ja útgávan vi› Toni Braxton sí›ani hon debutera›i í 1993. Ikki er nógv broytt hjá Toni Braxton sí›ani byrjanina. Hendan útgávan, sum er gjørd av fleiri ymiskum framlei›arum har tey tr‡ Toni Braxton, LA Reid og Babyface hava havt høvu›sábygdina, leggur seg rættuliga tætt uppat tí tónleiki, Toni Braxton higartil hevur lagt seg eftir at framføra.

Talan er um soul tónleik í tí léttara endanum, bleytan R&B vi› einum sletti av gospel. Sigast skal tó um n‡ggju útgávuna hjá Toni Braxton, at hon á hesari eisini roynir at leggja seg uppat tí rá›andi latinostílinum. Her ver›ur hugsa› um My Spanish Guitar og I'm Still Breathing. Ta› fyrra av hesum løgum er framleitt av ongum minni enn David Foster, sum kanska onkur kennur aftur frá bólkinum Chicago, sum var nógv at hoyra her heima fyri nøkrum árum sí›ani.

Eins og er vanligt á fløgum av hesum slag, so er eisini ríkiligt vi› kendum gestum. Fólk sum Dr. Dre, Babyface, Lisa "Left Eye" Lopez og Keri, rætta øll Toni Braxton eina hjálpandi hond. Um hetta er vi› til at betra um útgávuna skal tó vera ósagt. Hetta er avgjørt ikki ein fløga sum mær dámar. Tónleikurin er alt ov polera›-ur og ke›iligur til at eg skal tíma at lurta eftir honum. Einki er at ivast í at Toni Braxton, eins og Whitney Houston og Mariah Carey, eigur nógvar vinir her heima, og hjá teimum er henda fløgan eitt gott keyp.

a-ha

minor earth, major sky

Norsku a-ha komu av álvara fram í 1985, tá teir komu vi› síni fyrstu útgávu, Hunting High And Low. Í samband vi› hesa útgávuna eru ta› nokk tey flestu sum minnast til stakfløguna Take On Me, og minniliga sjónbandalagi›. Hetta sjónbandalagi› var í 1985 ein revolution, og hevur sí›ani veri› vi› til at definera hvussu eitt sjóbandalag eigur at vera gjørt.

Átta ár eru nú farin sí›an a-ha seinast lótu frætta frá sær vi› fløguni Memorial Beach. Hesa tí›ina hava limirinir í bólkinum fjasast vi› ymiskt anna›. Eitt nú hevur sangarin Morten Harket lati› nakrar solo fløgur úr hondum, og tangentleikarin Pål Waaktar Savoy, hevur saman vi› konuni Laureen Savoy roynt seg vi› bólkinum Savoy.

Minor earth, major sky, sum n‡ggja fløgan eitur, er ein afturvendan til popprøturnar hjá a-ha. Burtur eru rokkutu løgini sum merktu tær bá›ar seinastu útgávurnar framman undan hesari. Í sta›in er ta› vælframleiddur nútí›ar popptónleikur sum møtir lurtaranum.

Eins og hjá Madonnu vi› Ray Of Light, er ta› okkurt, sum bendir á, at a-ha hava megna› at endurn‡ggja seg sjálvar vi› hesi útgávuni. Og tá vit állíkavæl sammeta vi› Madonnu, kunnu vit eisini nevna, at produktiónin á onkrum einstøkum løgum minnir ikki so líti› um ta›, sum William Orbit gjørdi fyri Madonnu á Ray Of Light.

Hetta skal tó ikki skiljast solei›is, at a-ha eru farnir at apa seg eftir Madonnu. A-ha eru framvegis a-ha, og teirra tónlistarligu ey›kenni eru framvegis intakt. Løgini á hesi útgávuni eru flest øll gó›, hóast onkur einstakur svipsari er at finna. Hóast limirnir í a-ha eru farnir at eldast, so er einki sum bendir á at teir eru til rei›ar at leggja árarnar inn. Røddin á Morten Harket er á hesi fløgu framvegis so krystal klár, sum tá hann hoyrdist fyrstu fer› fyri 15 árum sí›ani.

Fyrsta stakfløga av minor earth, major sky er sangurin, summer moved on, sum hevur klára› seg væl á sølulistum uttanlands. Eisini hevur fløgan sjálv selt væl, og ta› er alt sum bendir á, at a-ha framvegis eru at rokna millum teir tungu dreingirnar. Ein avbera gó› fløga.

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttaSosialin kann sjálvandi eisini lesa á alnetinum: www.sosialurin.fo

Føroyameistararnir fingu góða byrjan

Annað umfar í fótbóltslandskappingini hjá kvinnunum varð leikt um vikuskiftið, og nógv bendir á, at HB er eins væl fyri í ár, sum tær vóru í fjør

HEINI Í SKORINI

Um vikuskiftið varð annað umfar í fótbóltskappingini hjá kvinnunum leikt. Í bólki A, har liðini eru HB, Skála, VB, GÍ, Sumba og AB, hevur HB fingið eina góða byrjan við sigrum í báðum teim fyrstu dystunum. Seinasta vikuskiftið vunnu tær heili 9-0 á Skála, og hetta vikuskiftið eydnaðist teimum á heimavølli at vinna 3-1 á VB. Tann altíð vandamikla Maria Johnsson legði HB á odda eftir eitt korter, men bert tveir minuttir seinni javnaði málslúkarin Halltóra Joensen fyri VB. Í 33. minutti legði Fríða Petersen HB framum til 2-1, sum eisini var hálvleiksstøðan. Í seinna hálvleiki kom bert eitt mál, og var tað Eyðfríð Kristiansen sum sló sigurin fastan til 3-1. Sostatt hevur HB nú fult stigartal eftir tveir dystir, og ikki kann sigast annað, enn at hóast tað sá sera svart út hjá teimum fyrr í ár vegna fólkatrot, hava HB kvinnurnar fingið eina sera góða byrjan uppá kappingarárið.

Tveir aðrir dystir skuldu eftir ætlan verða spældir í sama bólki, og vóru tað dystirnir millum GÍ-Sumba og Skála-AB. Men av hesum báðum dystum var bert fyrri dysturin leiktur, og henda dystin vann GÍ sannførandi 5-0. Heidi Jacobsen setti hol á málveitsluna hjá GÍ, og síðani gjørdi Kristbjørg Isaksen ikki mætari enn at skjóta eitt reint hattrick, harav eitt brotsspark, áðrenn Judi Justinussen sló sigurin fastan til 5-0.

Hin dysturin í bólki A skuldi eftir ætlan vera millum Skála og AB, men hesin dysturin varð tíverri ikki spældur, av tí at eingin dómari møtti upp. Seinasta vikuskiftið skuldi AB eftir ætlan spæla á útivølli móti GÍ, men hesin dystur varð eisini útsettur vegan kava. AB hevur sostatt ikki spælt nakran dyst í landskappingini enn.

Støðan í bólki A er hon, at HB hevur seks stig eftir tveir dystir, GÍ og VB hava trý stig, men GÍ hevur sum sagt ein dyst til góðar. Sumba og Skála hava ikki fingið nakað stig til høldar, og tey bæði liðini hava spælt ávikavist tveir og ein dyst. AB hevur sum sagt ikki spælt nakran dyst enn.

Bólkur B

Í bólki B eru liðini B36, KÍ, B71, EB/Streymur og NSÍ. Har hevur eitt lið frí hvørt vikuskiftið, av tí at bert fimm lið eru í bólkinum, og hetta vikuskiftið var tað B36 sum kundi hvíla. Dystirnir vóru so ímillum EB/Streym-B71 og KÍ-NSÍ.

Bæði EB/Streymur og B71 taptu seinasta vikuskiftið móti ávikavist NSÍ og B36, so bæði liðini vóru sera uppsett uppá at vinna. Tá avtornaði var tað B71 sum lá omaná við einum 2-0 sigri, og hóast tað til tíðir var rótut spæl, var tað betra liðið sum vann. Málini komu frá Sólrun Olsen og Elin Højsted, men tað var ein leikari hjá B71, sum átti stóran part av æruni fyri góða úrslitið, og var tað Tóra Nolsøe. Vanliga er hon útileikari, men av tí at málverjin hjá sandingum gav avboð, mátti hon fara í málið, og sum skilst frá B71 venjaranum, Martin Kúrberg, spældi hon ein góðan dyst.

Hin dysturin var sum sagt í Klaksvík ímillum KÍ og NSÍ, og KÍ vann sera sannførandi 6-1. Hálvleiksstøðan var 3-0, og var tað Rannvá Andreassen við tveimum málum, og Malena Josephsen við einum, sum komu á máltalvuna. Í seinna hálvleiki minkaði Irdi Hansen um munin fyri NSÍ, áðrenn Viviann Rasmussen, Ragna Andreassen og Malena Josephsen slóðu sigurin so dyggiliga fastan.

Støðan í bólki B er hon, at heili fýra lið hava trý stig, og eru tað B71, NSÍ, KÍ og B36. KÍ og B36 hava tó bert leikt ein dyst, meðan hini liðini hava spælt tveir. EB/Streymur hevur tapt báðar dystirnar, so tær liggja í botninum við ongum stigum.

Úrslitini hesi bæði fyrstu vikuskiftini hava verið hesi:

Bólkur A:

HB-Skála 9-0
HB: Maria Johnsson 3, Vivian Thorleifsson 2, Eyðfríð Kristiansen 2, Annika Godtfred 2.

VB-Sumba 5-0
VB: Halltóra Joensen 3, Marita Joensen 1, Rannvá Augustinusen 1

GÍ-AB
(Útsettur vegna kava)

HB-VB 3-1
HB: Maria Johnsson 1, Fríða Petersen 1, Eyðfríð Kristiansen 1.
VB: Halltóra Joensen 1.

GÍ-Sumba 5-0
GÍ: Heidi Jacobsen 1, Kristbjørg Isaksen 3,
Judi Justinussen 1.

Skála-AB
(Eingin dómari møtti upp)

Bólkur B:

B71-B36 1-4
B36: Rakul N. Joensen 2, Palma Petersen 1, Sunfríð Simonsen 1.
B71: Sólrun Olsen 1.

NSÍ-EB/Streym 4-1
NSÍ: Mariann Isaksen 1, Irdi Hansen 2, Sóleyð Einarsson1.
EB/Streym: Maria Niclasen 1.

KÍ-NSÍ 6-1
KÍ: Rannvá Andreassen 2, Ragna Andreassen 1, Malena Josephsen 2, Viviann Rasmussen 1.
NSÍ: Irdi Hansen 1.

EB/Streym-B71 0-2
B71: Sólrun Olsen 1, Elin Højsted 1.

Støðan, bólkur A

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 HB	2	2 - 0 - 0	12	1	11	6
2 GÍ	1	1 - 0 - 0	5	0	5	3
3 VB	2	1 - 0 - 1	6	3	3	3
4 AB	0	0 - 0 - 0	0	0	0	0
5 Skála	1	0 - 0 - 1	0	9	-9	0
6 Sumba	2	0 - 0 - 2	0	10	-10	0

Støðan, bólkur B

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1 KÍ	1	1 - 0 - 0	6	1	5	3
2 B36	1	1 - 0 - 0	4	1	3	3
3 B71	2	1 - 0 - 1	3	4	-1	3
4 NSÍ	2	1 - 0 - 1	5	7	-2	3
5 EB/St.	2	0 - 0 - 2	1	6	-5	0

Trý tey fremstu liðini í hvørjum bólki koma víðari til endaspælið

TB er tyktað

Umframt at vera sent úr steypakappingini hevur FSF álagt teimum á Tvøroyri at rinda bót

Teir á Tvøroyri vóru neyvan glaðir fyri tað, tá teir kendu seg noyddar at geva avboð til tveir dystir í bólkaumfarinum í kappingini um løgmanssteypið.

Tað var føroyskur fótbóltur í síni heild heldur ikki, og nú hevur kappingarnevndin hjá FSF tikið tær avleiðingar av støðuni hjá TB, sum teir sambært grein 37 í kappingarreglunum fyri fótbólt halda seg eiga at gera.

Í fráboðan til TB mánadagin verður sagt, at TB er koyrt úr kappingini fyri løgmanssteypið í ár. Harafturat skal TB rinda seks túsund krónur í sekt – trý túsund krónur fyri hvønn dystin, sum teir ikki møttu.

Fyri hini feløgini, sum vóru í bólki saman við TB – FS Vágar, GÍ og HB – kennist avgerðin hjá FSF á tann hátt, at øll málini, sum eru skorað í dystunum móti TB, nú verða strikað í støðutalvuni. Hesi liðini verða sett at fáa trý stig fyri hvønn dyst, sum tey skuldu havt spælt móti TB, og stigini verða vunnin við málmuninum 0–0.

Hetta fær tó ikki týdning fyri støðuna í bólkinum, tí er talan um javnstøðu í stigum, verða innanhýsis dystirnar fram um málmunin.

JH

Í kvøld skulu GÍ og HB spæla útsettan dyst í Gøtu. Undan hesum seinasta dystinum í bólki trý er støðan nú henda:

	dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
FS Vágar	6	3 - 2 - 1	6	6	0	11
GÍ	5	3 - 1 - 1	6	4	2	10
HB	5	3 - 1 - 1	3	5	-2	10
TB	6	0 - 0 - 6	0	0	0	0

Máltindurin, kvinnur

Maria Johnson	HB	4
Halltóra Joensen	VB	4
Kristbjørg Isaksen	GÍ	3
Eyðfríð Christiansen	HB	3
Irdi Hansen	NSÍ	3
Rakul N. Joensen	B36	2
Sólrun Olsen	B71	2
Annika Godtfred	HB	2
Vivian Thorleifsson	HB	2
Malena Josephsen	KÍ	2
Rannvá Andreasen	KÍ	2

adidas